**Dr. Kári á Rógvi**

# Strategitilmæli frá dekani Søgu- og Samfelagsdeildar

# Bygnaður S&S deildar:

Strategitilmæli frá dekani Søgu- og Samfelagsdeildar ....1
Fortreyt....1
Alment....2
Dekanur:....2
Vísindafólk í føstum starvi:....2
Vísindafólk ið skulu setast:....2
Vísindafólk í atknýttum starvi:....2
Onnur í føstum starvi:....2
Onnur atknýtt: ....2
Framleiðsla:....2
Løgfrøði:....2
Hini: ....3
Framleiðslumál:....3
Útbúgvingar....3
Bachelor í Søgu, Samfelagsfrøði ....3
Straregiskt Tilmæli....4
Navn: Samfelagsvísindi (alternativt SamVísindi)....4
Fígging:....4
Framleiðslumál 2010-2012:....4
Undirvísing....4
Gransking:....4
Framleiðslumál 2012-2015:....5
Undirvísing....5
Gransking:....5
Almennur Bachelor í Samfelagsvísindum ....5
Upptøka: ....5
Serliga um fak innan lóg og atknýtt fak....6
Stakskeið í lóg ....6
Master í Lóg ....6
Diplom í Almannafyrisiting....6
Bygnaður:....6
Setanir ....6
Serliga um Granskingardepilin....7

## *Fortreyt*

Hetta tilmæli er skrivað eftir samskifti við rektara og fundir deildini, herundir tað ávegis stratetilmæli, ið framkomið er frá starvsfólkunum undir leiðslu av Elini Súsannu Jacobsen (sí hjálagt), og fundir í bygnaðarbólkinum.

Høvundur er síðani 1. februar settur dekanur fyribils.

## *Alment*

### Dekanur:

- Lektari í løgfrøði Dr. Kári á Rógvi

### Vísindafólk í føstum starvi:

- Løgfrøðingur, lektari í 1/1 starvi (tíðarbundið ½): Kári á Rógvi
- Løgfrøðingur, adjunktur í ½ starvi: Hanna Vang
- Stjórnmálafrøðingur, adjunktur í 1/1 starvi: Jens Christian Svabo Justinussen
- Søgufrøðingur, adjunktur í 1/1 starvi: Hans Andrias Sølvará
- Búskaparfrøðingur, adjunktur í ½ starvi: Ólavur Christiansen
- Stjórnmálafrøðingur, adjunktur í 1/5 starvi: Beinta í Jákupsstovu
- Søgufrøðingur, adjunktur í 1/5 starvi: Elin Súsanna Jacobsen

### Vísindafólk ið skulu setast:

- Etnologur, adjunktur í 1/1 starvi (tíðarbundið: vikarur fyri Pr. Dr. Dr. Jóan Paula Joensen)
- Samfelagsfrøðingur, lektari í 1/1 starvi
- Løgfrøðingar, 2 ferðir 1/5 tíðarbundið fyri Kára á Rógvi

### Vísindafólk í atknýttum starvi:

- Etnologur, professari í 1/1 starvi (farloyvi sum rektari): Jóan Pauli Joensen
- Søgufrøðingur, adjungeraður lektari (virkar á Forngripasavni): Andrass Mortensen
- Geografur, adjungeraður lektari: Rolf Guttesen
- Søgufrøðingur, adjungeraður amanuensis (virkar á Forngripasavni): Erland Viberg Joensen

### Onnur í føstum starvi:

- Eileen Vang ¾

### **Onnur atknýtt:**

- Óvist tal av fólki á Granskingardeplinum fyri samfelagsmenning.

Víst verður til fyrru frágreiðingar mínar í bygnaðarbólkinum um henda stovnin.

## *Framleiðsla:*

Á vári 2010 verður henda framleiðsla:

### Løgfrøði:

- Grundskeið í Lóg, 15 ECTS á bachelorstigi – stakskeið.
- Føroysk fyrisiting, 10 ECTS á masterstigi – staksskeið.
- Mannarættindi og revsirættur, 10 ECTS á masterstigi – staksskeið.
- Gransking

## Hini:

- Gransking
- Fyrireiking

## *Framleiðslumál:*

- 30 ECTS undirvísing fyri hvørt ársverk
- Partvíst kann hetta gerast við leiðbeining, t.d. ísbv. serritgerð
- Partvíst kann hetta gerast við at selja øðrum deildum og stovnum undirvísing

Hesi mál eru meting dekans.

Ongi kend almenn framleiðslumál eru.

Ongin hoyring hevur enn verið um hesi mál... helst verður at frætta um slíka seinni.

## *Útbúgvingar*

### Bachelor í Søgu og Stjórnmálafrøði

Hava verið sera væl umtóktar útbúgvingar. Seinasta útskriving var 2009.

Nøkur lesandi (u.l. 7) eru eftir, ið fáa freist at gera seg lidnan við bachelornám í ár.

Nøkur lesandi eru innskrivaði á masterstigi í stjórnarmálafrøði, men taka eisini lógfak.

# Straregiskt Tilmæli

## *Navn: Samfelagsvísindi (alternativt SamVísindi)*

Mælt veður til at deildin fær heitið *Samfelagsvísindi* – meiri poppuitt SamVísindi – Social Sciences á enskum.

Í longri formi verður hon eyðvitað viðhvørt nevndin deildin fyri (Department of)...

## *Fígging:*

Útboðið fakum og plássum skal vera somikið stórt, at bæði á fakum boðin út burturav 'eftir marknaðartørvi' og á vanligum fakum (boðin út í nóg stórum tali, so altíð valmøguleki er) skal vera pláss til at taka upp stakgreinalesandi, herundir lesandi av øðrum deildum, lærarar í eftirútbúgving, skiftislesandi og onnur uttanseturslesandi.

Málið má vera, at umleið ¼ av størvunum verða fíggjaði eksternt.

Koma fleiri inntøkur eiga tilsvarandi fleiri starvsetaninar at gerast.

## *Framleiðslumál 2010-2012:*

## Undirvísing

- 30 ECTS undirvísing fyri hvørt ársverk
- Partvíst kann hetta gerast við leiðbeining, t.d. ísbv. serritgerð
- Partvíst kann hetta gerast við at selja øðrum deildum og stovnum undirvísing ella bjóða út ískoytisútbúgvingar fyri gjald ('framleiðlsa eftir marknaðartørvi')
- Við grundmanning uppá 8 vísindafólk (+dekan) verður framleiðslan 240 ECTS árliga:
    - 60 ECTS á bachelorstigi fyrru hálvu
    - 40 ECTS á masterstigi fyrru hálvu
    - 20 ECTS eftir marknaðartørvi fyrru hálvu
    - 60 ECTS á bachelorstigi seinnu hálvu
    - 40 ECTS á masterstigi seinnu hálvu
    - 20 ECTS eftir marknaðartørvi seinnu hálvu
- Tey adjungeraðu verða sett inn svarandi til vegleiðingartørvin, alt. verður útboð minkað
- Nakað av yvirskotskapaciteti verður fyrstu tíðina, sum kann leverast øðrum deildum.

## Gransking:

- Granskingarmenning ígjøgnum PhD-tilgongd hjá vísindastarvfólki við tíðarfreist
- Lektarmeting innan tíðarfreist sambært setanarskjali
- Grundleggjandi lærubøkur í fleiri samfelagsvísindum
- Annars ávíst framleiðslutal av kunngjørdum greinum/bókum mett fyri hvørt fakið sær

## *Framleiðslumál 2012-2015:*

## Undirvísing

- Við grundmanning uppá 16 vísindafólk (+dekan) verður framleiðslan 480 ECTS árliga:
    - 40 ECTS á bachelorstigi I (1.-2. ár) fyrru hálvu
    - 60 ECTS á bachelorstigi II (3. ári) fyrru hálvu
    - 90 ECTS á masterstigi fyrru hálvu
    - 50 ECTS eftir marknaðartørvi fyrru hálvu
    - 40 ECTS á bachelorstigi I (1.-2. ár) seinnu hálvu
    - 60 ECTS á bachelorstigi II (3. ár) seinnu hálvu
    - 90 ECTS á masterstigi seinnu hálvu
    - 50 ECTS eftir marknaðartørvi seinnu hálvu
- Tey adjungeraðu verða sett inn svarandi til vegleiðingartørvin, alt. verður útboð minkað

## Gransking:

- Granskingarmenning ígjøgnum PhD-tilgongd vísindastarvfólki við tíðarfreist
- PhD-framleiðsla av eksternt fíggjaðum stipendiatum
- Lektarmetingar innan tíðarfreist sambært setanarskjali
- Professarametingar
- Grundleggjandi lærubøkur í fleiri samfelagsvísindum
- Granskingarbøkur í fleiri samfelagsvísindum
- Annars ávíst framleiðslutal av kunngjørdum greinum/bókum mett fyri hvørt fakið sær

## *Almennur Bachelor í Samfelagsvísindum*

Hetta er hugsan rektarams – at gjørdur verður almennur samfelagsbachelor, ca. eftir hesum leisti:

*Felags* (tvey ár):

- 30 ECTS pr. hálvár innan útboð uppá ca. 40–60 ECTS umframt 'eftir marknaðartørvi'

*Valt (eitt ár):*

- 30 ECTS eitt hálvár í fakum, sum byggja á útboðið á 1.-2. ári
- 30 ECTS uppgáva, alt. minni og so eyka fak.

## *Upptøka:*

Verður ætlandi áhaldandi, tvs. so hvørt pláss er, kunnu fleiri tekna seg.

Dømi: lesandi skriva seg inn 1. november 2012 – freist til 1. november 2015; fær góðskrivað Grundskeið í Lóg (15 ECTS) og nær at taka onnur løgfrøðiskeið sama heyst (í alt 15 ECTS); tekur síðani fak úr nevndu bólkum, so hvørt tey verða boðin út, stundum saman við lesandi 'á 1. ári',

stundum við lesandi 'á 2. ári' ella 'á 3. ári' og stundum saman við 'stakgreinalesandi' ið verða tikin upp alt eftir plássi.

### *Serliga um fak innan lóg og atknýtt fak*

Sí hjálagt upprit um lukrativa jura.

### Stakskeið í lóg

Hava verið sera væl umtókt og fíggjarliga sjálvberandi.

6 ferðir higartil (í 8 flokkum) Grunskeið í Lóg – 'klassikarin.'

1 ferð Føroyskur Kollektivur Arbeiðsrættur.

### Master í Lóg

Ætlanin var langt komin, men seinkað av sparingum. Tá ið 2 ársverk í løgfrøði eru tryggjaði deildini kann byrjast – tilmælt longu í heyst.

### Diplom í Almannafyrisiting

Er ætlan, sum løgd er í samráði við Almannastovuna og ALS. Longu í vár verða fleiri teirra til GíL; í heyst byrjar so ein tilgongd við 1/2-tíðarlestri, 60 ECTS-dilpom á bachelorstigi.

Seinni kunnu hugsast bachelornám og masternám innan sama øki.

## ***Bygnaður:***

Mælt verður til at lata deildina halda fram við egnum dekani, sum tó fær heimild at útdelegera:

1. Útbúgvingarábyrgd (almenna bachelor, almennan master, serligan master í X...)
2. Fakábyrgd (tey 4-5 fakøkini, sum kunnu leverað til:
   a. útbúgvingar á S&S
   b. útbúgvingar á øðrum deildum og skúlum
   c. gransking

## **Setanir**

Mælt verður til <u>alt fyri eitt</u> at seta 1 ársverk á skrivstovuna/vísindahjálparfólk, hækkandi til t.d. 1 pr. 4 vísindafólk sum frá líður.

Mælt verður til, at hvørt av satsingsfakunum beinanvegin fær minst tvey ársverk:

- 2 ársverk í søgu
- 2 ársverk í lóg
- 2 ársverk í stjórn
- 2 ársverk blandaði í stuðulsfakum
- 1 ársverk dekanur

Mælt verður til, at arbeitt verður framímóti innan 2012:

- 4 ársverkum í søgu og siðsøgu (etnologi)
- 4 ársverkum í stjórn og samfelag (sociologi o.l.)
- 4 ársverkum í lóg
- 4 ársverkum í blandaðum stuðulsfakum (búskapi, hagfrøði, osfr.)
- 1 ársverk dekanur

## *Serliga um Granskingardepilin*

Mælt verður til, at Granskingardepilin verður avtikin sum rakstrarstað.

Leiðarin eigur at fáa bjóðað starv í miðfyrisiting Fróðskaparseturs sum verkætlanarleiðari, hvørs uppgáva skal vera at søkja granskingarstuðul, sum fer til at keypa granskingartíð frá SamVísindum (og øðrum deildum) til verkætlanargranskingar.

Restin av føstu lønar- og rakstrarjáttnaini verður flutt Søgu- og Samfelagsdeildini (sum hon enn eitur).

Sum skjótast verða søgd úr starvi øll føst og atknýtt starvsfólk á Granskingardeplinum við vanligari uppsagnartíð ella tá ið tíðarbundin starvstíð gongur út.

Samstundis verður lýst eftir vísindastarvsfólki á Søgu- og Samfelagsdeildini svandi til fluttu føstu játtanina og metta tørvin til verkætlanargranskingar.